# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Úlfur Hjörvar farin

Sunnudagin 9. november doyði føroyavinurin og íslendingurin, Úlfur Hjörvar, í heimi sínum í Keypmannahavn. Úlfur varð borin í heim í Reykjavík 22. apríl 1935.

Úlfur hevur skrivað og týtt ein hóp av verkum og fingið tey útgivin á íslendskum ella flutt í útvarpi ella á leikpalli heima í Íslandi. Hann týddi bæði leikrit, skaldsøgur og yrkingar úr nógvum ymiskum málum til íslendskt. Nevnast kunnu verk eftir Knut Hamsun, Tony Morrison, Karen Blixen, Poul Vad, Dario Fo, Sam Shepard, og William Heinesen Úlfur skrivaði sjálvur leikrit og stuttsøgur. Í 2002 gav hann út stuttsøgusavnið "Sjö sögur".

Árini 1999-2005 búði Úlfur í Havnini, meðan konan, Helga, var stjóri í Norðurlandahúsinum. Árini í Føroyum lærdi Úlfur seg føroyskt og kunnaði seg væl um føroysk viðurskifti m.a. serliga um nýggjar føroyskar bókmentir. Úlfur hevur hesi seinastu árini týtt fleiri føroysk verk til íslendskt eitt nú verk eftir Oddvør Johansen, Jóanes Nielsen og onnur.

Úlfur Hjørvar verður jarðaður úr Dómkirkjuni í Reykjavík fríggjadagin 21. november kl. 15.



†

### Andlát og jarðarferðir

**Mona Haraldsen**, Vestmanna, andaðist í heiminum mánadagin, 73 ára gomul.

**Ragnhild Hansen**, Miðvágur, andaðist mánanáttina, 96 ára gomul. Kistan fer av Sýnini mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Raghild, kunnu lata eina gávu til Miðvágs kirkju.

### Dagurin

**12. november.** Torkil. Teir vita ikki um nakað halgimenni við hesum navni, men tað er komið við í danskar álmanakkar frá 1725. Navnið er norrønt og er samansett av gudsnavninum Tórur, og Ketil, sum merkir hattur ella hjálmur.

## Millumskúlaflokkur í Kirkjubø 1941

Her er ein mynd frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er ein millumskúlaflokkur í Kirkjubø í 1941. Sum tað sæst á myndini, so hava tey øll fingið røtur.

Vit kenna ikki øll á myndini, men nøkur av teimum eru: Lilly Lava Olsen, Elsebeth Winther, Maria (hjá Bedingsmeistaranum), Brynhild Eysturlíð, Torfinn Lambaa Olsen, Bette Samuelsen, Hervør Samuelsen, Mena Hansen, og Lena Juul.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, ella veit meira um næmingarnar á myndini, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 311)

*Myndaeigari: Duddan Thomsen*

